# Gerandisdagur við góðari blanding




*tað er bæði spennandi og upplyftandi, tá ið Óli Johannesen megnar at halda Thenry Henry í stuttum tjóðri, ella tá ið Rógvi Jacobsen vinnur luftdystir við írsku leyvurnar*

**Triðja og fjórða ættarliðið, sum fyri tað mesta eru at finna heima á klettunum, skulu saman við týdningarmiklum veteranum stríðast fyri at varðveita støðuna á altjóða styrkislistanum**

**ALTJÓÐA LUTTAKARARNIR**

*Jóannes Hansen*

Tað er serligur rómur og hýrur, tá ið ellivu føroyingar standa andlit til andlit við eitt nú fronsku og írsku heimsstjørnurnar, og tað er bæði spennandi og upplyftandi, tá ið Óli Johannesen megnar at halda Thenry Henry í stuttum tjóðri, ella tá ið Rógvi Jacobsen vinnur luftdystir við írsku leyvurnar.

Men tað er ein royndur lutur, at fyri Fótbóltssambandið, leiðararnar og venjararnar, spælararnar og eisini áskoðararnar og pressuna er tað vorðið afturvendandi rutina, at landsliðið tekur lut í EM og HM undankappingum, og at Føroyar og landsliðið nakrar ferðir um árið eru samrøðuevni í altjóða fótbóltspressuni.

Jens Martin Knudsen er tann einasti, ið er eftir av sekstan manna liðnum, sum spældi fyrsta altjóða skrásetta landsdystin á Akranesi 8. august í 1988, og sum vann 1-0 á Eysturríki í Landskrona 12. september í 1990. At seta strikur millum spælarar og siga, at hesin hoyrir til fyrsta og hasin til næsta ættarliðið av landsliðsspælarum er sjálvandi ómøguligt. Men um vit rokna teir, sum vóru fyrstu ferð á landsliðnum í aðru undankappingini, at hoyra til næsta ættarliðið, so er skjótt at staðfesta, at tað eisini farið at tynnast í næsta ættarliðnum. Her verður hugsað um Óla Johannesen, Toda Jónsson, og Jákup Mikkelsen.

Hvat aldri viðvíkur hevur tað verið eitt sindur ymiskt, nær spælararnir eru slopnir framat. Pól Thorsteinsson er eisini omanfyri tredivu, og nú er Julian Johnsson, sum í fleiri ár taldist millum yngstu landsliðsspælararnar, eisini farin um tey tredivu.

Jens Martin Knudsen hevur onkra ferðina lýst, hvussu tað var, tá ið Føroyar traðkaðu fyrstu altjóða skógvarnar. Páll Guðlaugsson plagdi at siga, at teir vóru við fyri at læra, og soleiðis var tað í orðsins sanna týdningi. Ikki bara á vøllinum, men eisini tá ið tað viðvíkti karmunum kring dystirnar og fyrireikingarnar og tilrættaleggingini sum heild.

Tað var ikki fyrrenn miðskeiðis í níti árunum, at lunnar vórðu lagdir undir umsitingina hjá Fótbóltssambandinum, og nú er talan um fastar mannagongdir og harvið meiri ella minni um rutinu, tá ið dystir og kappingar verða løgd til rættis og avgreidd.

## Kenna ikki til annað

Vandin í lítlari fótbóltstjóð er, at royndirnar, ið summir hava fingið, detta niður ímillum, tí gloppið til teir næstu verður ov stórt. Soleiðis er tað ikki á landsliðnum. Sambært FIFA styrkislistanum hevur tað eydnast Føroyum so toluliga at hildið plaseringina. Føroyar eru eini 15-20 pláss lægri á listanum, enn landsliðið var, tá ið styrkislistin av fyrstan tíð varð útroknaður fyri einum tólv árum síðani. Orsøkin til fallið hevur ikki verið, at føroysku úrslitini hava verið serliga nógv øðrvísi seinnu árini, enn tey vóru fyrru árini. Heldur hevur orsøkin verið, at aðrar tjóðir aðra staðni í heimi-